DAGSINS MEINING

ACD ryggásin í nýggjari samgongu

Tað skal eitt undur til, um samgonga skal síggja dagsins ljós, áðrenn tingið kemur saman í morgin. Samráðingar eru millum A,C,D og E. Tær hava gingið væl, men tað tykist at ganga meira striltið, nú sjálvstýristilgongdin og búskapurin eru komin á skránna. Tað ljóðar, at E vil hava munandi niðurskurð í blokkinum komandi árini, nakað, sum C ikki gongur við til. Semja er um einstakar yvirtøkur. Spurningurin er so, hvar A og D standa í hesum. Tá hugsað verður um dóm veljarans yvir hesar flokkar og eisini útsagnir frá teirra leiðandi politikarum um nettup varsemi, má roknast við, at teir treyðugt fara at góðtaka krøv frá E um munandi skerjingar av blokkinum. Men ilt er at siga nakað við vissu. Tí nógv er taktiskt spæl. Fyri tað um E spælir út við víðgongdum krøvum, so kann tað bara vera fyri at markera seg. Hann kann draga í land aftur við at vísa á, at alternativið er B.

Vit loyva okkum at gita, at tað eru teir tríggir flokkarnir í miðjuni ACD, ið koma at seta dagskránna, nakað, ið er mest í tráð við ynski veljarans, og skal bera til at fáa eina arbeiðsføra stjórn. Skal E vera við má tað flyta seg munandi. Vil E tað ikki, má roknast við, at løgmaður fer at kalla inn B. Og hetta merkir, at B verður noytt til at førka seg munandi.

Nú hevur B gott nokk roynt at fornýggja seg í sjálvstýrismálinum og sagt seg vilja ganga nýggjar leiðir. Men hetta hevur so ongantíð enn útkrystaliserað seg í ítøkiligan politikk. Hjá ACD standa tey í eini tvístøðu. Summi vilja hava E við, onnur heldur B. Ein kann tí siga, at tann av hesum, ið vil lora mest inn móti miðjuni, verður sannlíki samgongupartnarin. Vil hvørgin tað, er tað aftur ein 16-16 støða. Antin verður hon roynd ella verður nýval.

Nú fáa vit at síggja, hvussu ultimativ møgulig krøv frá E til blokkniðurskurð eru. C ger ræt í at standa fast við ikki at skerja blokkin komandi tíð, tí fyrsta høggið av blokkinum varð so ógvusligt. Vit mugu fyrst síggja fylgjurnar av tí. Harfyri má bera til at halda fram við at fremja yvirtøkur, ið eru í tráð við eina hóvliga stig fyri stig sjálvstýristilgongd. Nakað, ið bæði A og D hava víst á. Verður neyðugt at fáa B við í samráðingarnar, mugu flokkarnir á miðjuni krevja av B, at tað flytur seg longur miðjuni og gongur við til ein stig fyri stig sjálvstýrispolitikk. Skulu pólarnir inn í hitan mugu teir sjálvandi rokna við at bráðna nakað.

Føroyar hava brúk fyri eini stjórn, ið fær ein savnandi politikk á miðjuni, har sjálvstýriskósin ikki verður slept men fær eitt náttúrligt og skilagott tempo. ACD eru ryggásin í eini semjusøkjandi konsensusloysn. So má tað vera upp til E og B at avgera, hvussu langt móti miðjuni tey vilja fara. Løgmaður ger skilagott í at gera pólflokkunum hetta púra greitt. Og tá kann hann jú prógva, at hann loksins megnaði at liva upp til lyfti síni um eina breiða samgongu, sprottin úr miðjuni í føroyskum politikki. Her er so serstakliga hugsað um ríkisrættarliga ásan. Vónandi ber til at gera líknandi semjur, eisini tá tað snýr seg um vinstra-høgra ásan. C má vera garanturin fyri, at vit ikki fáa eitt rák til høgru, og at vit fáa eina hóvliga og skipaða sjálvstýristilgongd.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

At verkfalls-maraton bert rakar útjaðaran má halda uppat

Jógvan við Keldu

Soleiðis sum verkfallini seinastu árini hava rakt útjaðaran, er hetta ein háðan móti innulívi, hóttan móti vanligari "fólkaligheit" og ein skaðilig ávirkan fyri menningina hjá hjá okkum, sum búgva uttanfyri Havnina.

Ein hevur hug at hugsa, at sentralu fakfeløgini hava eina nærri yvirorðnaða tilætlaða langtíðarætlan í samband við hesi verkfall, ið einans gera útjaðaranum ónáðir, at tey skulu raka útjaðaran so meint, at tey hjálpa til at gera av við hann.

Leggjast kann afturat, at greinin hjá Gunnleivi Dalsgarð í Dimmalætting leygardagin hevur ikki sanført meg um nakað annað - heldur tvørturímóti.

Hesin skrivar um "høgrarákið hevur fingið vind í seglini", um "hentar idiotar", at "fakfelagsstríðið verður gjørdd til eina pest", ella "um ein vil virða verkfallsrættin".

At sita í fjálgum stóli í Havnini, og ikki skilja, at verkfallið sum nú er bert rakar ein part, nevniliga útjaðaran, meðan alt hansara egna umhvørvi livir fullkomiliga óávirkað, um verkfallið so hevði varað í eitt ár afturat.

Mong samd við Hergeiri Lat tað verða undirstrikað, at eg eri ikki tann einasti, sum taki undir við Hergeiri Nielsen í tí sum hann sigur - men mong við mær - har hann og alt hansara fólk líður mest undir einum árligum afturvendandi hurlivasa. - Men Vágoyggin, Sandoyggin og Norðuroyggjar líða eins væl undir hesum.

Eg mótmæli eisini, at vit verða skýrd sum mótstøðufólk av fakfeløgum, tá vit geva ilt av okkum í einum máli, sum kundi verið loyst fyri døgum, ja vikum síðani.

Vit eru ikki ímóti at verkfallsrætturin verður nýttur, men at hann verður misnýttur, soleiðis sum hann nú verður, tað kann ikki góðtakast, og serliga, at tað bert eru somu partar sum ár um ár liggja undir fyri hesum óskili, sum mest minnir um eina gíðslatøku fyri okkara øki.

At løgtingið ikki hevur lagt upp í hetta skilaleysa verkfall, sum ikki rakar Gunnleiv Dalsgarð og alt hansara geografiska umhvørvi, og tí ikki kennir nakrar avleiðingar av hesum, líkist ongum.

Nú havi eg verið burturstaddur seinastu vikuna, og tí ikki merkt so nógv til hetta.

Hetta skal loysast nú

Løgtingið átti longu beint eftir finteljingina at havt gripið inn her, tí okkara samfelag verður fullkomiliga lagt í oyði vinnuliga og umdømi okkara á føroyskt vinnulív fellur, sum árini ganga.

- Tað hevur nú kanska ikki tann stóra týdningin fyri Gunnleiv Dalsgarð sjálvan.

Finna Ellintur Abrahamsen og Karsten Hansen ikki út av hesum nú , er neyðugt, at løgtingið fer inn, og tað er ongantíð ov skjótt.

Hergeir Nielsen, tøkk fyri tína djørvu, beinraktu og neyðugu átalu. Eg vóni, at allur tín flokkur skilir teg. - Gunnleivur Dalsgarð kann sjálvandi sita í egnum stóli og verja Føroyaland til avlívs.

Neyðugt verður hjá eini nýggjari samgongu at fáa viðurskiftini á sjóvegissambondunum millum oyggjarnar í eina trygga legu í framtíðini, so at hetta ikki endur tekur seg.

Tíðindaskriv

Undirritaðu flokkar hava í dag sent løgmanni soljóðandi fráboðan:

5. mei 2002 sendu undirritaðu flokkar løgmanni skriv, har boðað varð frá, at Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin stóða saman sum ein bólkur upp á 16 tinglimir. Hetta varð gjørt til tess at fáa javnar samráðingar um skipan av nýggjari samgongu eftir løgtingsvalið, tá framman undan var greitt, at Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vóru gingnir saman í ein bólk.

Hetta stigið hevur so ikki fört til hvørki formansrundu ella til javnar samráðingar, og tískil hava undirritaðu flokkar gjørt av at boða løgmanni frá, at henda avtala frá 5. mei 2002 skal er til longur.

Samstundis skal boðast frá, at um løgmaður til fyrsta fundin í løgtinginum framvegis heldur fast um sitandi 16-manna samgongu, so hava Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin gjørt ein valbólk upp á 16 tinglimir til val av formansskapi og løgtingsnevndum.

Tórshavn 10. mei 2002
Sambandsflokkurin
Javnaðarflokkurin
Miðflokkurin

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Politisk marra!

Kaj Leo Johannesen
Tórshavn tann 10.05.2002

Løgtingsvalið gjørdist ein sonn marra fyri allar føroyingar. Sum er hava vit eina fastlæsta støðu.

Løgmaður vil ikki geva loyvi til eina formansrundu, ið kundi givið okkum ein parlamentariskan meiriluta. Løgmaður vil ikki flyta seg tí hann metur, at støðan er javnleikur 16 - 16.

Um vit nú eina løtu góðtaka hesa grundgeving løgmans um javnleik við 16 tinglimum til samgongu og 16 tinglimum til andstøðu, so mega vit eisini góðtaka tann veruleika, at tað standa 673 fleiri atkvøður aftanfyri teir 16 tinglimirnar hjá andstøðuni, so her haltar javnleikurin nakað.

Øll siga at veljarin hevur altíð rætt, og hvat segði veljarin ?

15.605 søgdu NEI til samgonguna hjá løgmanni, meðan 14.932 søgdu JA

Hevur løgmaður givið valjaranum rætt, við at tosa um javnleik millum 15.505 og 14.932 ?

Er løgmaður rætt endurgivin, so ætlar hann í verandi støðu, sum hann sjálvur hevur skipa fyri, at verða sitandi við 16 løgtingslimum. Hann ætlar ikki at halda fram við verandi sjálvstýristilgongd. Sjálvstýri Føroya fólks ætlar hann at parkerað, og hann ætlar ikki at gera nakað við blokkin.

Hvat sigur Tjóðveldisflokkurin til slíkan politikk?

Mær dámar betur málburðin hjá Høgna Hoydal. Hann sigur at allar hurðar framvegis eru opnar fyri breiðum samstarvi. Hvør er tað sum smekkar hurðina aftur, táið Høgni letur hana upp ?

Sambandsflokkurin heldur tað vera skeivt, at steðga sjálvstýristilgongdini. Í okkara Nýskipanaruppskoti er júst ætlanin at menna sjálvstýristilgongdini, menna okkara sjálvsræði, okkara ávirkan, okkara persónliga frælsi, okkara valmøguleikar og okkara rættindi. Okkara uppskot gevur eisini pláss fyri øllum yvirtøkum, uttan teimum, ið hava við sjálva loysingina at gera.

Er tað ikki nógv betur, at brúka sjálvstýristilgongdina hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, heldur enn at parkera alt í fýra ár???

Landslæknin loysti gordiska knútin !

Trygvi F. Guttesen

Høgni Debes Joensen skal hava stóra tøkk fyri sína grein í Dimmalætting hin 7. mai í ár.

Greinin, sum ber heitið "Ljós yvir landið" vísir á hvussu vit best kunnu koma burturúr verandi fastlæstu støðu, og hvussu vit best kunnu leggja til viks tað æviga sjabbið og aggið.

Høgni D. Joensen endar sína grein við at minna á orðini hjá tjóðarskald okkara Hans Andrias :

"Samanhald má vera"
Eg taki undir við áheitanini hjá Høgna D. Joensen, um at skipa eina samgongu við øllum seks flokkum, og lat meg gera tað við at minna á eitt annað tjóðarskald okkara, Mikkjal á Ryggi, ið hevur so nógv at læra okkum í sálminum : Guð, tú sum býður !

4. ørindi av hesum sálmi:
Fólkið títt sameint teg biður:
Gev okkum fagran sigur;
Øvundin missi sín mátt.
Lýsi tín heilagi friður
av fjalli í fjøru niður,
uttan og innan gátt.
Virka vit so í semju, alt vit evna.
Elska næstan, aldri illgerð hevna,
tá gerst okkum blíð hin stóra stevna,
og vit teg á fríðum fundi fevna.
Lat okkum støðga á, lurta, hugsa og síðani taka røttu avgerðirnar, sum vit øll kunnu fegnast um langt fram í tíðina.

Føroyingar á listahátíð

TÍÐINDASKRIV

Í dag fara Jan Christiansen, Helga Hjørvar og Birgir Kruse til Íslands, at verða til staðar, tá Listahátíð Reykjavikar verður sett í morgin klokkan 14.

Í sambandi við setanina skulu føroysku umboðini hitta íslendska mentamálaráðharran Tómas Ingi Olrich og bretska mentamálaráðharran Tessa Blackstone, baronessu. Stevnan í Reykjavík varir 11.-31. mai 2002 og hevur heimasíðu www.artfest.is

Fyrsta Listahátíðin av hesum slagi varð hildin í Reykjavík í 1970 og heiðursforseti er Vladimir Ashkenazy meðan forseti Íslands Ólafur Ragnar Grimsson er verji stevnunnar. Formaður í umboðsráðnum er Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, borgarstjóri í Reykjavík. Undir herrópinum "Máttarstolpi Listahátíðar í Reykjavík" er Búnaðarbankin stórsti privati stuðul við samstarvssáttmála í eitt fýra ára skeið.

Ávíst samstarv er millum Listastevnu Føroya og líknandi stevnur í grannalondum. Hóast altskyns stevnur eru kring okkum í Norðuratlantshavi, so er eingin árlig stevna, onnur enn Listastevna Føroya, ið hevur sett sær fyri á hvørjum árið at hava eitt fjøltáttað innihald, ið umboðar allar listargreinar. Meðan føroyska Listastevnan verður hildin á hvørjum árið, verður stevnan í Reykjavík hildin á øðrum hvørjum ári. Aðrar stevnur, sumeru á hvørjum árið, halda seg til hina einu listagreinina, sum tal dømis rokk-tónleik ella sjónleik. Listastevna Føroya roynir sum hin einasta í Norðuratlantshavi at samansjóða listagreinarnar við at fara um mørk og á hvørjum árið at bjóða eina fjøltáttaða stevnu á listarligum støði.

Høvuðsevnið á Listastevnu Føroya í ár verður New York bólkurin Sequentia, sum fer at framføra "Edda", sum byggir á íslendsku Eddu-kvæðini. Hetta verður fyrsta framførslan í einum norðanlandi av hesum verki, sum við talgildari tøkni byggir á elsta norrøna skaldskapin. Haraftarat verða fremstu oljubýirnir í grannalondum okkara, Aberdeen og Stavanger, umboðaðir við ávíkavist rokkbólkinum Runrig og gospelsangaranum Sigvart Dagsland.

Listastevna Føroya verður hildin 3.-18. august 2002.

Sum stórstu íleggjarar hava Norðurlandahúsið og Tórshavnar Býráð formansskapin í Listastevnu Føroya. Meðan Norðurlandahúsið hevði formansskapin í fyrstu føroysku Listastevnuni í fjør, við Karin Kjølbro sum umboðsráðsformanni og Helgu Hjørvar sum stýrisnevndarformanni, so hevur Tórshavnar Býrað formansskapin í ár. Jan Christiansen borgarstjóri er formaður í umboðsráðnum, har øll listafólk eru umboðaði. Formaður í stýrisbólkinum fyri Listastevnuna er Birgir Kruse, valdur av Tórshavnar Býráð. Høvuðsstuðlar, sponsorar, á Listastevnuni í ár, eru Føroya Banki og Føroya Sparikassi. Samskipari fyri Listastevnu Føroya er Oddvá Nattestad.

Tjóðardagur Ísraels í Føroyum

TIÐINDASKRIV

Týsdagin 14. mai klokkan 18.00 verður tjóðardagur Ísraels hildin við almennum fundi í Havn. Tað eru teir tríggir føroysku Ísraelsfelagsskapirnir Vinir Ísraels í Føroyum, Ísraelsfelagið og Ísraelsmissiónin, ið skipa fyri.

Fundurin verður á Vaglinum í Havn. Røður verða hildnar. Tað eru formenninir í teimum trimum feløgunum Dánjal Poulsen (Vinir Ísraels í Føroyum), Svenning av Lofti (Ísraelsfelagið) og Ásbjørn Jacobsen (Ísraelsmissiónin), ið tala. Røtt verður millum annað um týdningin av, at vit sum tjóð stuðla Ísrael, at Ísrael hevur rætt til sítt land og at verja seg móti kríggi og yvirgangi, og at vit sum kristin bera teimum gleðiboðini um Jesus Messias aftur. Sangur og tónleikur verður eisini á skránni.

Jødahatrið (antisemitisman), sum var nógv frammi fyri og undir seinna heimsbardaga er tíverri við at vinna fram aftur í londunum uttanum okkum, og hetta harmast vit nógv um, og ynskja vit eisini at mótarbeiða.

Tað var tann 14. mai 1948, at David Ben Gurion í Tel Aviv las upp yvirlýsingina um at tjóðin Ísrael varð endurstovnað. Hetta hendi eftir at ein lítil meiriluti í ST hevði tillutað jødiska fólkinum eitt lítið landaøkið í miðeystri.

At Ísrael fekk sítt land aftur eftir fleiri túsund ár í útlegd stendur eisini skrivað í Bibliuni, millum annað hjá Ezekiel 36, 28: "Tit (Ísrael) skulu búgva í tí landinum, sum eg gav fedrum tykkara, og tit skulu vera fólk mítt, og eg skal vera Gud tykkara".

David Ben Gurion stóð á odda fyri tí jødisku tjóðini tey fyrstu árini, og longu dagin eftir, at yvirlýsingin varð upplisin, lupu grannatjóðirnar á Ísrael og kríggj brast á.

Tann endurstovnaða jødiska tjóðin verður týsdagin 54 ár, og hóast nógv kríggj og ófrið, hevur tjóðin yvirlivað.

Tann ísraelski tjóðardagurin verður sum sagt hildin á Vaglinum týsdagin klokkan 18. Um tað ikki viðrar verður hann ístaðin hildin á Hotel Hafnia. Fundurin er almennur, og øll eru vælkomin.

Tá ísraelska tjóðin varð stovnað